# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 27.02.2025 kl. 17.00

Á fundi: Janus Thomsen
Poul Laust Christiansen
Rakul Mørk
Jóhannes Liasson Rasmussen
Thorstein Thomsen (fyri Jónfinn Poulsen)
Ruth Midjord Berg (fyri Otto West)

Ikki møtt: Ronni Hammer

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **102-6-2025: Val av umboði til felags eldraráð í Suðuroy.**
   Súsanna Niclasen varð vald sum umboð fyri Hvalbiar Kommunu í 2021. Janus Thomsen hevur tosað við Súsannu og er hon áhugað at halda fram.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at velja Súsannu Niclasen sum umboð fyri kommununa valskeiðið 2025-2028.

2. **102-7-2025: Umsókn um stuðul frá Nýggjársnevndunum og Bygdarfelagnum.**
   Umsóknir frá Nýggjársnevndunum og Bygdarfelagnum um framhaldandi stuðul hetta valskeiðið.
   **Fíggjarnevndin 24.02.2025:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at stuðla Nýggjársnevndini í Hvalba við kr. 35.000,00, Nýggjársnevndini í Nesi við kr. 10.000,00 og Bygdarfelagnum á Rananum við kr. 10.000,00 árliga hetta valskeiðið 2025-2028.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at stuðla Nýggjársnevndini í Hvalba við kr. 40.000,00, Nýggjársnevndini í Nesi við kr. 15.000,00 og Bygdarfelagnum á Rananum við kr. 15.000,00 árliga hetta valskeiðið 2025-2028.

3. **102-8-2025: Umsókn um fíggjarligan stuðul til "Summartónar".**
   Søkt verður um stuðul til "Summartónar", sum eftir ætlan verður í Hvalba tann 31. mai 2025.
   **Trivnaðarnevndin 25.02.2024:**
   Nevndin mælir til at stuðla tiltakinum, soleiðis at tiltakið kann verða.
   **Fíggjarnevndin 24.02.2025:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at stuðla við kr. 10.000,00, treytað av, at tiltakið verður hildið.

**Avgerð**:
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

4. **102-33-2024: Umsókn um byggiloyvi til útbygging á matr. nr. 117b, Hvalba:**
Søkt verður um byggiloyvi til útbygging av gróthúsi, sum stendur á trøð matr. nr. 117b í Hvalba.
**Tekniska nevnd 20.02.2025:**
Nevndin mælir til, at byggiloyvi verður givið.
**Avgerð**:
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá byggimálsviðgeranum og nevndini og geva byggiloyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum, treytað av, at byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda byggiloyvi og niðanfyri nevndu treytum frá Friðingarmyndugleikunum:

5. **102-9-2025: Tilboð frá KJ uppá rampur til maskinuna:**
Býtis-tilboð TLB20810 frá KJ Hydraulik P/F uppá alurampur er kr. 18.750,00 – tá eru alurampurnar til gomlu maskinuna tiknar í býti.
**Tekniska nevnd 20.02.2025:**
Nevndin mælir til at taka av tilboðnum.
**Fíggjarnevndin 24.02.2025:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum frá KJ.
**Avgerð**:
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

6. **102-5-2025: Bingjuplássið í Hvalba – kostnaðarmeting.**
Ørvur Norðberg hevur gjørt eina kostnaðarmeting av at liðuggera bingjuplássið í Hvalba – kr. 1.156.009,00, íroknað stoyping (Hvalbiar Kommuna) kr. 433.600,00.
Tilboðið frá MTV Byggivirki uppá stoyping er kr. 698.500,00.
**Tekniska nevnd 20.02.2025:**
Nevndin tekur undir við kostnaðarmetingini og mælir til, at arbeiðið fer í gongd skjótast gjørligt.
**Fíggjarnevndin 24.02.2025:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum frá MTV Byggivirki uppá stoyping og annars fáa arbeiðið gjørt sambært fyriliggjandi kostnaðarmeting, grundað á, at arbeiðsmenninir hjá kommununi ikki hava tíð ella arbeiðsorku til hesa verkætlan.
**Avgerð**:
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

7. **102-10-2025: Gøtan um Heygsvatn.**
Mettur kostnaður fyri umvæling av gøtuni um Heygsvatn er kr. 35.000,00.
**Tekniska nevnd 20.02.2025:**
Nevndin mælir til, at arbeiðið verður gjørt skjótast gjørligt.

**Fíggjarnevndin 24.02.2025:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at fáa arbeiðið gjørt sambært kostnaðarmetingini.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum. Harumframt varð samtykt at taka hædd fyri og játta møguligan meirkostnað, um asfalt ella betong verður lagt á.

8. **102-11-2025: Kostnaðarmeting – asfalt matr. nr. 180e, Hvalba.**
Í sambandi við vegagerð í Garðsenni 2023/2024, varð nógv ferðsla eftir Nýggjavegi og varð túnið á matr. nr. 180e nógv nýtt til víkipláss.
**Vega- og havnanevndin 24.02.2025:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at játta kr. 14.000,00 sambært kostnaðarmeting.
**Fíggjarnevndin 24.02.2025:**
Samtykt varð einmælt at mæla til leggja asfalt á túnið sambært kostnaðarmeting.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

9. **102-12-2025: Atløga við oljupumpuna á Hamranesi.**
Kostnaðarmetingin fyri valdu loysnina at gera umstøðurnar betri til atløguna við oljupumpuna á Hamranesi er kr. 45.600,00.
**Vega- og havnanevndin 24.02.2025:**
Einmælt samtykt at mæla til, at arbeiðið verður gjørt, soleiðis at bátarnir hava betri umstøður til atløgu við oljupumpuna og at játta kr. 45.600,00 sambært kostnaðarmeting.
**Fíggjarnevndin 24.02.2025:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at fáa arbeiðið gjørt.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

10. **102-13-2025: Kostnaðarmeting – Hamranes.**
Á suðursíðuni í brimgarðinum á Hamranesi, eru nøkur sár komin, sum mett verður átroðkandi at fáa umvæld, so skaðin ikki gerst størri. Mett verður, at umleið 140 m3 eru eftir at stoypa – kostnaður umleið kr. 700.000,00.
**Vega- og havnanevndin 24.02.2025:**
Nevndin mælir einmælt til, at hetta verður játtað sambært kostnaðarmeting kr. 700.000,00.
**Fíggjarnevndin 24.02.2025:**
Samtykt varð einmælt at mæla til játta hesum og fáa umvælingina gjørda sambært kostnaðarmeting.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.30